# ÚT- OG SJÓNVARPSSKRÁ

Jógvan Jacobsen talar um Fjallaprædikuna (14. partur)
14.00 Føroyskir sangir og sálmar
15.00 Tónleikur
16.00 Barnarásin (EvR) - Sent verður frá barnamøtinum á Argja skúla - Barnarás bólkur av Argjum skipar fyri
16.30 Tónleikur
20.00 Kelduvaðið (EvR) (e) - Endursending frá kl. 13.00 í dag - Páll og Maria Poulsen siga frá um kristniboðan - Jógvan Jacobsen talar um Fjallaprædikuna (14. partur)
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
0.00 Liðugt

**Mánadagur 25. februar**
9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Tónleikur
11.00 Fólk á rásini (e) - Endursending frá leygardegnum - Vagnur Michelsen hevur samrøðu við Dánjal Norðberg (fyrra sending)
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16.00 Tónleikur
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á Leiðini (EvR) (e) - Endursending frá hósdegnum - Evni: Jesus og strongd (2. partur) - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Halleluja - Andalig tónleikasending v/ Heina Lützen og Jógvan Poulsen
22.30 Tónleikur
23.00 Liðugt

**Týsdagur 26. februar**
9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11.00 Ferðslurásin (e) - Endursending frá fríggjadegnum - Ferðslusending í samstarv við Ráðið fyri ferðslutrygd - Sonne Smith er vertur
12.00 Tíðindi og kunngerðir

Lindin

**Leygardagur 23. februar**
9.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
9.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
9.15 Okkara dagliga breyð
9.30 Tónleikasending fyri børn
10.00 Norðurlenskur tónleikur
11.00 »Spyr Harran fyrst« (e)
12.00 Lívgandi Orð
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
14.00 Brot og bitar, samandráttur frá tíðindasendingunum frá farnu viku
14.30 Tónleikasending fyri børn
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen (e)
16.00 Tónar og Innihald v/ Høgna H. Hansen og Jan Zachariassen (e)
17.00 Sjómansendingin Vitin v/ Símun Hansen
18.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.05 Tónleikasending v/ Jens Lisberg
20.00 Tónleikasending fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Leygarkvøld í Lindini, um missión - vertur Fríðtór Debes
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskrá fyri sunnudag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins orð, okkara dagliga breyð o.a.
2:00 Tónar & Innihald (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, Okkara Dagliga Breyð, o.a.
6.00 Vit gevast

**Sunnudagur 24. februar**
9.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
9.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
9.15 Okkara dagliga breyð
9.30 Barnalindin beinleiðis sending úr studio A, vertur er Lív Jacobsen
10.00 Lovsangur
12.00 Møti
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Lovsangur
14.30 Barnalindin Barnasending v/ Lív Jacobsen (e)
15.00 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
16.00 Teldan velur løg
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 »Vón fyri teg« (e)
20.00 Barnalindin Barnasending v/ Lív Jacobsen (e)
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Møti (e)
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri mánadag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, Okkara Dagliga Breyð, o.a.
2:00 Horizon Star (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, Okkara Dagliga Breyð, o.a.
6.00 Vit gevast

**Mánadagur 25. februar**
13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.15 Okkara dagliga breyð
14.30 »Jesus og eg« barnasending v/ Stellu Zachariassen (e)
15.00 Bønarlinjan frá hósdegnum verður endursend
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan - Biðji verður fyri bønarevnunum
19.00 Brot & Bitar, ørvísi tíðindasending
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 »Tónleikur fyri tilkomin« v/ Steindor og Tórbjørn
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri týsdag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, Okkara Dagliga Breyð, o.a.
2:00 Møti (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, Okkara Dagliga Breyð, o.a.
6.00 Vit gevast


## FÓLK TIL MÓTTØKUNA Á SMYRIL LINE

Søkt verður eftir tilkomnum fólki til móttøkuna á Smyril Line.

Viðkomandi skal verða røkin, hava teldukunnleika, verða fryntlig/-ur og umframt norðurlendsku málini duga enskt og helst eisini nakað av týskum.

Løn samb. avtalu.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Umsóknin, merkt "Móttøkufólk", verður at senda til:

SMYRIL LINE
Postsmoga 370 • 110 Tórshavn

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Síðan 1983 hevur MF Norröna, ið hevur pláss til 1.050 ferðafólk og 300 bilar, silgt millum Norðanlond. Vegna vaksandi talið av ferðafólkum byggir Smyril Line nýtt skip, sum verður sett í sigling á várið 2003. Nýggja Norröna verður 30.000 BRT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn og sluppina "Norðlýsið".



**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**



## HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56




Leygardagin 23.02. kl. 19$^{00}$
Leygardagin 23.02. kl. 21$^{15}$
Sunnudagin 24.02. kl. 18$^{00}$
Sunnudagin 24.02. kl. 20$^{15}$




Leygardagin 23.02. kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 24.02. kl. 22$^{45}$




Leygardagin 23.02. kl. 20$^{45}$
Sunnudagin 24.02. kl. 20$^{45}$




Leygardagin 23.02. kl. 18$^{45}$
Sunnudagin 24.02. kl. 18$^{45}$




Leygardagin 23.02. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 24.02. kl. 22$^{30}$




Billettprísur: 45,- kr.
Leygardagin 23.02. kl. 16$^{45}$
Sunnudagin 24.02. kl. 15$^{45}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu






# Statoil Føroyar
## søkir eftir rakstrarleiðara

**Til rakstrardeild okkara søkja vit eftir leiðara**

**Starvið**
Starvið umfatar handfaring av oljuúrdráttum, tað verið seg móttøku, goymslu og víðari flutning til brúkaran. Eisini umfatar starvið menning av deildini, soleiðis at brúkarin fær bestu tænastu skipaða eftir dagførdum mannagongdum.

**Høvuðsuppgávur**
- At skipa flutningin av oljuúrdráttum til viðskiftafólk okkara.
- At verða dagligur leiðari hjá starvsfólkum okkara á rakstrardeildini.
- At leggja til rættis innkeyp av oljuúrdráttum herundir avgreiðslu av tangaskipum.
- At samskipa arbeiðið á goymslum okkara.
- At gera mánaðaruppgerðir á goymslum okkara.
- At hava ábyrgdina av útreiðsluætlanum hjá rakstrardeildini.
- At hava ábyrgdina av, at allar ásettar rakstrar-, trygdar- og umhvørvisskipanir verða fylgdar.
- At útbúgva starvsfólk og menna verandi skipanir.

**Vit bjóða**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Møguleikar eru eisini at dagføra royndir á rakstrarstøðum hjá Statoil uttanfyri Føroyar og at luttaka á skeiðum innan samtakið.

**Førleiki**
Nýggi rakstrarleiðarin skal verða ágrýtin, framtakshugaður og duga væl at samstarva við viðskiftafólk og starvsfelagar.
Royndir sum leiðari, at nýta teldu og at handfara oljuúrdráttir geva fyrimun.

**Setanarviðurskiftir**
Rakstrarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til leiðslu felagsins.

Lønin verður sett eftir útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**P/f Statoil Føroyar**
**att. Niels Juel Nattestad,**
**Postboks 3098, Viðarnes,**
**FO-110 Tórshavn, innan 8. mars.**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Endamálið hjá Statoil Føroyar er at veita brúkarum kring landið oljuúrdráttir og aðrar vørur. Fyri Statoil Føroyar arbeiða uml. 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og bestu tænastu.
Umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.

**STATOIL**
*- fyri viðskiftafólk okkara*

petur & petur • +298 320870




# Fiskaborð og rock'n roll í Eydnuni



*Birgir Enni er uttan iva Føroya besti fiskakokkur*

**Tann 6. apríl skipar GÍ fyri stórfingnum tiltaki í Eydnuni á Oyrabakka. Birgir Enni, víðagitin kokkur, stendur fyri sermerktum fiskaborði og Robert McBirnie borgar fyri góðum undirhaldi og dansi**

UNDIRHALD
*Dagfinn Olsen*

Tann 6. apríl skipar GÍ fyri forvitnisligum tiltaki í Eydnuni. Talan er um fiskaborð við øllum góðum úr havinum, alt frá tara til øður. Undirhald og dansitónleikur verða eisini partur av skránni.

### Kendur kokkur

Tað verður Birgir Enni, ið stendur fyri fiskaborðinum. Birgir er kendur út um landoddarnar sum góður kokkur, serliga tá um mat úr sjónum ræður. Sum skipari - og kokkur - umborð á Norðlýsinum, hava gestir mangan upplivað hansara matkynstur.

Men eisini kring heimin er hann boðin sum kokkur. Hann hevur eittnú fleiri ferðir vitjað á Fjørðukrónni í Íslandi og hevur eisini kokkast í Eysturríki.

Tað sermerkta við Birgiri er, at hann mangan sjálvur hevur fingið hendur á rávørunum. Hann er nevniliga eisini góður kavari. Á skránni tann 6. apríl er mangt og hvat úr sjónum, alt frá tara til øður.

### Kendur rockari og undirhaldari

Aftur við borðinum, verður undirhald. Robert McBinie er helst ein hin kendasti og besti undirhaldarin í landinum. Hann borgar, saman við øðrum, fyri góðum undirhaldi.

Robert er eisini, um nakar, føroyski rockkongurin. Síðani sekstiárini hevur hann staðið á palli og tónleikur frá seksti- og sjeytiárunum stendur honum nær. Síðani dagarnar í Faroe Boys hevur Robert sett dám á føroyska rockpallin. Seinnu árini er tað saman við sínum vinmonnum, at hann hevur leikt til dans. Og tann 6. apríl verða tað Robert og Vinmenn, ið borga fyri góðum dansitónleiki í Eydnuni.

Atgongumerki til forvitnisliga tiltakið í Eydnuni á Oyrabakka tann 6. apríl kunnu keypast í forsølu í næstu viku.


## FRÍTÍÐARAVLOYSARAR TIL FERÐAMANNADEILDINA Á SMYRIL LINE

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til ferðamannadeild okkara.

Viðkomandi skal verða røkin, hava teldukunnleika, verða fryntlig/-ur og umframt norðurlendsku málini eisini duga enskt og helst eisini nakað av týskum.

Løn samb. avtalu.

Størvini verða at seta í nærmastu framtíð.

Umsóknin, merkt frítíðaravloysari, verður at senda til:

SMYRIL LINE
Postsmoga 370 • 110 Tórshavn

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Síðan 1983 hevur MF Norröna, ið hevur pláss til 1.050 ferðafólk og 300 bilar, silgt millum Norðanlond. Vegna vaksandi talið av ferðafólkum byggir Smyril Line nýtt skip, sum verður sett í sigling á várið 2003. Nýggja Norröna verður 30.000 BRT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn og sluppina "Norðlýsið".





# Tillukku SÍ...

Tryggingarfelagið Trygd ynskir SÍ hjartaliga tillukku við steypinum.

*Ikki bara tryggingar, men eisini trygd*

**TRYGD**

Gongin 7 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 35 81 00 Fax 31 72 11 e-mail: trygd@post.olivant.fo www.trygd.fo

petur & petur • 320870